

# BARNA- OG UNGDÓMSPOLITIKKUR

Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU



## "TÚ ERT **DJARVARI**, ENN TÚ HELDUR, **STERKARI** ENN TÚ SÆRT ÚT OG **KLÓKARI** ENN TÚ VEITST AV."

**– PALLI PUMM**



# INNGANGUR

Tórshavnar kommuna vil við hesum arbeiði seta barna- og ungdómspolitikk á breddan og framhaldandi vera í fremstu røð á barna- og ungdómsøkinum.

Barna- og ungdómspolitikkurin er ætlaður øllum, sum Barna- og ungdómsdeildin varðar av. Politikkurin er ætlaður til at vísa á, hvat kommunan vil við sínum yngstu og ungu borgarum.

Børnini og tey ungu eru framtíðin, og tí leggur Tórshavnar kommuna stóran dent á at geva børnum og ungum í kommununi best møguligar umstøður at vaksa upp í.

Børnini og tey ungu eru ein stóran part av tíðini á kommunalum stovnum. Tey eru í vøggustovu, barnagørðum, frítíðarskúlum og ungdómshúsum. Tí vil Tórshavnar kommuna hava ein politikk á økinum, har kjarnuvirðini hjá kommununi, virðing, menning og trivnaður, eru ein sameindur partur.

Kommunan vil, at øll børn og ung í Tórshavnar kommunu skulu hava møguleika at vera í ymiskum barna- og ungdómsvirksemi, har rúm er fyri øllum – uttan mun til kyn, tjóðbólkaeyðkenni, førleikar ella sosiala bakgrund. Øll børn og ung hava rætt til, at vaksin taka jaliga og væl ímóti teimum. Tað vil siga, at vaksin eru nærverandi, rúmlig, faklig og mennandi. Alt hetta eggjar børnum og ungum til forvitni.

Tórshavnar kommuna vil eisini ganga á odda at fáa øll børn við, tí øll børn hava okkurt at bjóða øðrum. Kommununi tørvar fjølbroyttar borgarar.

# FAKFÓLK OG LEIÐSLA

Tórshavnar kommuna strembar eftir at hava dugnaligar og skikkaðar námsfrøðingar og faklig námsfrøðilig starvsfólk á øllum dag-, frítíðar- og ungdómsstovnunum. Ein kompetentur stovnur merkir eisini skikkað faklig starvsfólk, ið dagliga útinna sína námsfrøðiligu praksis, so tilboðið er dygdargott.

Tí er tað av stórum týdningi, at kommunan alsamt førleikamennir starvsfólkini á námsfrøðiliga økinum innan børn og ung, so at økið er dagført við atliti at vitan og arbeiðsmegi fyri at ganga framtíðar samfelags avbjóðingum á møti. Ein slík dagføring fevnir um fleiri, men eisini kompleks krøv til fakligar førleikar á fjøltáttaða námsfrøðiliga starvsøkinum. Somuleiðis er av týdningi, at kommunan alla tíð er ein **virkin og forvirkin viðleikari** í síni tilgongd til at finna dugnaligar og skikkaðar námfrøðingar og námsfrøðilig starvsfólk.

Fyri at børn og ung, sum eru knýtt at námsfrøðiligu stovnunum hjá kommununi, skulu hava bestu fortreytir og karmar at førleikamennast og trívast í, skulu námsfrøðin og nýggj gransking innan økið fáa høga raðfesting. Tí strembar og leggur kommunan seg eftir at **førleikamenna** fakfólk og starvsfólk síni, so stovnarnir altíð fylgja við og kunnu taka ímóti avbjóðingunum, ið koma. Tað er av týdningi, at stovnarnir hava ávís faklig aðalkrøv og dygdarskipanir, sum eru týðandi fyri økið. Tað er tí av alstórum týdningi, at starvsfólkini fáa tíð og umstøður til fyrireiking, so at námsarbeiðið á besta hátt kann útinnast.

Stovnsleiðslurnar skulu framhaldandi førleikamennast, so at tær eru førar fyri at taka ímóti framtíðar avbjóðingum. Kommunan skal skipa fyri at áhaldandi og reglubundin átøk verða fyriskipað, sum eru við til at geva stovnsleiðslunum meiri og betri leiðslukunnleika og uppstigan, núverandi og komandi. Tað er av stórum týdningi, at kommunan regluliga dagførir sínar stovnsleiðarar, so at teir eru førir at ganga framtíðini á møti.

Kommunan leggur alla orku í at halda og virka eftir dagstovnalógini, har ásetingarnar fyri settum fakfólki verða hildnar. Hetta skal gerast við átøkum, ið skulu fremja og virka fyri, at námsfrøðiligu stovnarnir hjá kommununi gerast góð og spennandi arbeiðspláss, har fakligheitin verður sett í miðdepilin, so at borgarunum verður tryggjað eitt so dygdargott tilboð sum gjørligt.

Kommunan vil vera fremst og viðvirkandi til nýggja námsfrøði, har **nýhugsan** og innovativ námsfrøðilig hugsan og arbeiði fáa rúm og ræsur og er á ferð.





# AT RÚMA, FELAGSSKAPUR OG INKLUSJÓN

Í Tórshavnar kommunu leggja vit dent á felagsskapin – at rúm er fyri øllum, og at øll hava sín týðandi lut í felagsskapinum. Vit síggja ymisleika sum eina styrki, og vit virða inklusjón og margfeldi.

At hoyra til, at verða møtt og verða góðtikin, sum tann, ein er, hevur stóran týdning fyri menniskju. Saman við øðrum mennast vit. Øll hava okkurt at bjóða felagsskapinum. Hetta er ein umráðandi hugburður. Tórshavnar kommuna vil, at hetta sæst aftur í námsfrøðiliga virkseminum.

Vit **rúma** við at leggja til merkis, við at hava áhuga í og við at virða alt menniskjað og tess eginleikar, atburð og sinnalag. Á tann hátt styrkja vit hugburðin: Øll eru okey, júst sum tey eru, við teirra førleikum, uppruna, kynsligum samleika, átrúnaði, tjóðbólkaeyðkenni og sosialu bakgrund.

Vit styrkja **felagsskapin** við at vaksin og børn/ung eru saman um ábyrgdina av at fáa tað ynskta, neyðuga og mennandi - í ymiskum støðum til at henda. Á tann hátt vekist og veksur felagskenslan og fatanin av at vera ein av heildini og gera mun.

Vit taka okkum av **inklusjón** við at brýggja okkum um og taka okkum av hvørjum øðrum. Pláss er fyri øllum, øll hava týdning og øll hoyra til. Fjølbroytni er felagsábyrgd, og á tann hátt verður hjúklað um VIT-kensluna.



# FORELDRASAMSTARV

Tórshavnar kommuna heldur, at foreldur eru tey **týdningarmiklastu** vaksnu í lívinum hjá barninum/tí unga, og at tað eru foreldrini, ið hava ábyrgdina av barninum/tí unga. Foreldur skulu kenna seg sædd, hoyrd og vird, og øll kunnu tey gera sítt og virka fyri samstarvi. Tí samstarvar Tórshavnar kommuna neyvt við foreldrini um menningina hjá børnum og ungum og stuðlar serliga teimum, sum hava tørv á hjálp til at styðja børnum sínum á bestan hátt.

Fyri at starvsfólk á stovnunum kunnu gera eitt munagott námsfrøðiligt arbeiði við barninum/tí unga í miðdeplinum, verður væntað, at foreldur eru ein natúrligur samstarvspartur og viðleikari.

Arbeitt verður við at skilja, hvat báðir partar vænta hvør av øðrum og gera greitt, hvønn leiklut og hvørja ábyrgd, hvør hevur – bæði foreldrini og tey faklærdu. Vit finna eisini fram til **felags ábyrgd**.



# FELAGS FAKLIGT SAMSTARV

Leiðslan á Barna- og ungdómsdeildini hevur ábyrgdina av, at ávís skipað viðurskifti eru tvørtur um deildir og fakbólkar. Fakpersónar hava í samstarvi við foreldrini ábyrgd av at tryggja samanhang og vísa á og finna **heildarloysnir**, sum eru til gagns fyri børnini og tey ungu.

Í Tórshavnar kommunu er eitt grundfest tvørfakligt, skyldubundið og samskipað samstarv millum dagstovnar, frítíðarskúlar, ungdómshús og Barna- og ungdómsdeildina og aðrar týðandi fakbólkar fyri at tryggja eitt høgt **felagsfakligt vitanarstig**.

Á barna- og ungdómsøkinum hjá Tórshavnar kommunu arbeiða ymiskir fakbólkar. At geva og deila vitan sínámillum og práta saman ger heildina størri, og hetta gerst gróðrarlendi fyri felagsfakligum átøkum fyri børnini og tey ungu í kommununi.

# FRÍTÍÐ OG MENTAN

Dagstovnar og aðrir stovnar, ið arbeiða við skipaðum námsfrøðiligum frítíðartilboðum til børn og ung, eru størsta og eitt hitt mest týðandi samfelagsliga og menningarliga uppgávuøkið í Tórshavnar kommunu. Tað røkkur langt inn í framtíðina.

Børn og ung eiga at verða møtt av fakliga skikkaðum starvsfólkum, ið eggja og stuðla upp undir fjølbroytta menning og læran. Tey skulu hava møguleika at menna síni **skapandi evni**, sína undran og sítt forvitni. Somuleiðis skal áhugi og virkishugur mennast og stimbrast – alt samalt sum partur av grundarlagnum fyri læran og menning. Kommunan vil við sínum skipaðu námsfrøðiligu tilboðum virka fyri, at børn og ung fáa bestu møguleikar, karmar og fortreytir fyri at mennast.

Í Tórshavnar kommunu skulu børn og ung hava møguleika at taka lut í fjøltáttaðum og virknum mentanarlívi og frítíðarlívi. Kommunan vil, at skipaða virksemið er livandi við fjøltáttaðum upplivingum og avbjóðingum í tryggum og góðum umhvørvi. Somuleiðis vil kommunan, at stovnar eru virknir við mennandi, kveikjandi, spennandi og avbjóðandi mentanarligum átøkum og frítíðartilboðum.

Tórshavnar kommuna skal skapa **karmar** fyri at mentan, list og tónleikur fáa góðar umstøður at virka saman við barna- og ungdómsstovnunum. Miðað eigur at verða fram ímóti einum ávísum samstarvi millum lista- og tónleikastøðini og námsfrøðiligu stovnarnar.







# HEILSA OG TRIVNAÐUR

Trivnaður er fortreyt fyri einum góðum lívi. Ein partur av hesum er at verða partur av einum sunnum felagsskapi, at kunna brúka og menna síni evni og sínar førleikar, fáa góðan kost og at hava eina góða heilsu.

Tórshavnar kommuna leggur dent á at hava eitt **heilsugott** tilboð til øll børn og ung í kommununi, har tey hava allar fortreytir fyri at kunnu trívast og mennast á besta hátt.

Hetta ber í sær, at stovnar til børn og ung í Tórshavnar kommunu skulu hava umstøður, har børn og ung fáa brúkt og ment síni skapandi evni og fjølbroyttu førleikar og samstundis kenna seg sum ein virðismettan part av felagsskapinum. Úti og inni skulu umstøðurnar vera stimbrandi, har børn og ung kunnu vera **virkin**, vera saman og vera hugbundin. Økið eigur at hóska til aldursbólkin, ið er á stovninum.

Eisini vil Tórshavnar kommuna eggja til, at børn og ung fáa góðar og sunnar matvanar. Tí skulu stovnar við børnum og ungum undir Tórshavnar kommunu vera tilvitaðir um matmentanina. Maturin, ið bjóðaður verður, skal vera heilsugóður og fjølbroyttur.

Fyri at tryggja, at øll børn og ung trívast og mennast á fullgóðan hátt, er neyðugt at lofta teimum børnum/ungum, ið av onkrari orsøk eru í vanda fyri ikki at gera tað. Tí er umráðandi at arbeiða **fyribyrgjandi**, og at starvsfólk við røttu fakligu førleikunum eru um børnini og tey ungu. Ein partur av tí fyribyrgjandi arbeiðinum er at samstarva við avvarðandi myndugleikar.

# SPÆL OG LÆRA

Vit læra í samspæli og í samskifti við onnur. Spæl er týdningarmikil partur av lívinum hjá øllum, og tí skulu allir stovnar í kommununi, ið arbeiða við børnum og ungum, hava **góðar karmar** til spæl bæði inni og uttandura. Hesum vil Tórshavnar kommuna virka fyri.

Tað er av týdningi, at tá ið vit skipa býin, at innrætta hann við tilboðum til allar borgarar, vaksin sum børn og ung. Børn og ung skulu fáa nyttu av býnum eins og onnur, og skulu tilboðini stimbra undir eitt virkið mentanar- og frítíðarlív, sum er við til at styrkja um almennu heilsuna, førleikarnar og samræðið hjá børnum og ungum. Harumframt skulu **býarrúmini** innrættast og sniðgevast soleiðis, at tey bjóða til rørslu, uppihald og samveru, umframt at havast skal í huga, at børn og ung skulu kunna ferðast trygt í býnum til gongu, á súkklu ella við almennu ferðsluni.

**Spæl er alneyðugt** og avgerandi fyri menningina hjá børnum. Spæl mennir mál, rørslu, treystleika, ábyrgdarkenslu, skapandi evnini, undran, nýhugsan, tollyndi, áhuga, áhaldni, forvitni, sosialar førleikar og mangt annað. Tí er sera umráðandi at hava tilvitaðar og nærverandi námsfrøðingar, sum virða og geva spælandi børnum og ungum ans, og at námsfrøðingarnir skilja tann týdning, ið spæl hevur. Teir skulu hava førleikar og hegni at verja spælið, samstundis sum námsfrøðingarnir eisini skulu skapa umhvørvi og umstøður, sum kunnu stuðla og styrkja spælið.

Tórshavnar kommuna virðismetir spælið sum eitt gott og **neyðugt ískoyti til samfelagið**, ið tryggjar, at vit á bestan hátt búgva børnini og tey ungu til avbjóðingarnar í framtíðini. Hegni at hugsa, samstarva og samskifta eru aðalkrøv í tí samfelagi, sum dagsins børn skulu fóta sær í sum ung og vaksin. Kravið snýr seg eisini um, at vit sum einstaklingar og starvsfelagar á fjøltáttaða arbeiðsmarknaðinum skulu vera smidlig, skulu taka nýggj stig, skulu avrika nógv, skulu vera **forvitin** og megna uppgávuna at leiða. Samstundis skulu vit eisini hava førleikar at seta okkum inn í alskyns viðurskifti og tryggja okkum upplýsing og duga at handfara miðlar og tøknifrøði. Alt hetta setur sín jaliga dám á og gevur ískoyti til trivnaðin.

Tá ið vit sniðgeva og byggja kommunalar bygningar, eiga vit at taka støði í brúkaranum. Sama er galdandi tá ið talan er um børn og ung. Tá er av alstórum týdningi at hoyra og taka **fakkunnleikan**, sum varðar av børnum og ungum, við í byggiætlanir.

Børn og ung skulu gerast ein natúrligur partur av kommununi, somuleiðis sum tær ymisku deildirnar í fyrisitingini hjá Tórshavnar kommunu skulu duga at hugsa børn og ung inn í avgerðir og bygging.





# FÓLKARÆÐI – ÁVIRKAN Á EGIÐ LÍV

Tórshavnar kommuna virkar til frama fyri fólkaræði og samræði. Børn og ung skulu, í tann mun teirra menning og búning loyvir tí, kunnast og hoyrast í avgerðum, ið viðvíkja teirra lívi og gerandisdegi. Børn og ung í Tórshavnar kommunu eiga í tann mun tey megna, at fáa ávirkan á og taka lut í tí umhvørvi og virksemi, sum tey eru ein partur av. Tórshavnar kommuna vil tí vísa børnunum ein hugburð, sum mennar og mentar eina fatan av fólkaræði.

Fólkaræði og samræði snýr seg um at børn og ung blíva **sædd** og **hoyrd**, umframt at tey kenna á sær, at teirra sjónarmið verða tikin við hvørja ferð, Tórshavnar kommuna ger politikkir og virkisætlanir, eitt nú kommunuætlan, heilsupolitikk, mentanarpolitikk og býarskipanarpolitikk. Soleiðis verða børn og ung eggjað til at taka lut og vera virkin í samfelagnum og fólkaræðinum og á henda hátt taka ábyrgd fyri egnum avgerðum, egnum lívi og felagsskapinum.

Tórshavnar kommuna virkar fyri, at børn og ung eru virkin í fólkaræðinum. Tey skulu seta orð á tilveruna, vera forvitin, skulu kunna hugsa seg um og fáa ein fjølbroyttan hugburð.

Virksemi á dagstovnunum og ungdómstilboðunum skal mennast við denti á virðing fyri **ymisleikanum** og við útgangsstøði í samábyrgd. Børn og ung í Tórshavnar kommunu skulu kenna, at teirra íkast hevur týdning, og at tey kenna seg vird, har tey eru. Tórshavnar kommuna hevur sín lut í ábyrgdini at siðmenna einstaka borgaran frá ungum árum, ið mennir fólkaræðisligu **ábyrgdina** hjá børnum og ungum.

Við at børn og ung taka lut í felagsskapum, ið rúma øllum kynum, tjóðbólkaeyðkennum, førleikum og sosialu støðum, læra børn og ung at virða og góðtaka ymisleikan við at vera partur av rúmliga og fjølbroytta felagsskapinum.

# VIÐ AT GERA ÍLØGUR Í BARNA- OG UNGDÓMSÁRINI VINNA VIT Í LONGDINI




Kelda: Heckmann

## AVKAST AV ÍLØGUM Í BØRN OG UNG



# ÚTGANGUR

Tórshavnar kommuna skal vera trygg at búgva í og at mennast í. Tórshavnar kommuna raðfestir karmar um tryggan uppvøkstur, menning og mentan fyri øll børn og ung.

Børn og ung skulu hava ávirkan á sín egna gerandisdag, tey skulu verða tikin við upp á ráð, so tey fáa ríkar møguleikar og rúmar ræsir, har tey saman við øðrum eru við til at skapa sambond, mennast og mentast í einum spælandi, lærandi og rúmligum umhvørvi - í vøggustovu, barnagarði, frítíðarskúla og ungdómstilboðum.

Fyri at skapa eitt trygt og mennandi umhvørvi fyri børn og ung í Tórshavnar kommunu, er tað umráðandi við væl útbúnum starvsfólkum - á øllum barna- og ungdómsøkinum. Eisini hevur tað týdning, at starvsfólk hava felags fakligt áralag, har tey eru tilvitað um, at tað er í felag, at vit rúma, møta og hoyra børn og ung á besta hátt.

Foreldur og familja hava fremsta týdning fyri børn og ung. At vera um børn og ung er ein felags uppgáva og felags ábyrgd. Tí er samstarvið millum foreldur og starvsfólk á barna- og ungdómsøkinum sera avgerandi fyri trivnaðin hjá børnum og ungum í Tórshavnar kommunu.

# ÁTAKSLISTI



# ÁTØK UM FAKFÓLK

| NR. | ÁTAK | SÍÐA | HØVUÐSÁBYRGD* |
|---|---|---|---|
| 1 | Námsfrøðingar: framtíðartryggja skikkað fakfólk á stovnunum, har minstamarkið í dagstovnalógini verður hildið | 4 | Starvsfólkadeildin, B&U |
| 2 | Kompetentir stovnar: Dygdargott námsfrøðiligt arbeiði | 4 | Býráðið, B&U, fíggjardeildin |
| 3 | Førleikamenning: Dagføring og gransking | 4 | B&U |
| 4 | Rekrutering av námsfrøðingum og námsfrøðiligum hjálparfólkum: yvirskipað tiltøk, ið varpa ljós á arbeiðsøkið | 4 | B&U, starvsfólka-deildin, stjórnin |
| 5 | Fyrireikingartíð: Tíð og umstøður at fyrireika námsfrøðiliga arbeiðið | 4 | Býráð |
| 6 | Innbjóðandi dagstovnar: Við fakligheit í miðdeplinum verður eitt dygdargott tilboð tryggjað | 4 | B&U, stovnarnir |
| 7 | Nýggj námsfrøði: Nýhugsan og innovatión innan námsfrøði | 4 | Býráðið, stjórn, B&U |

*tey, ið eru fyrstnevnd eiga ábyrgdina av skipa samstarv og lýsa átakið.

# ÁTØK UM INKLUSJÓN

| NR. | ÁTAK | SÍÐA | HØVUÐSÁBYRGD |
|---|---|---|---|
| 8 | Inklusjón og margfeldi: Hugburðsarbeiði við rúmligheit og felagsskapinum. | 5 | B&U, stovnarnir, snarskivan |
| 9 | Upplýsing til útlendingar: Kunningartilfar gerast. (Filmar, faldarar v.m.) | 5 | Býráðið, B&U, integratiónssamskiparin |
| 10 | Upplýsing til fakfólk: Kunningartilfar, fakligt tilfar og vitanardeiling. | 5 | B&U |
| 11 | Felagsskapur og at hoyra til: At gera arbeiðið sjónligt. | 5 | B&U, stovnarnir, snarskivan |
| 12 | Foreldrasamstarv: Gott foreldrasamstarv er avgerandi fyri integratiónina av barninum. | 5 | Stovnarnir |
| 13 | Altjóða móðurmálsdagur: Stovnarnir hava ávís tiltøk, ið varpa ljós á evnið integratión. | 5 | B&U, stovnarnir |



# ÁTØK UM FORELDRASAMSTARV

| NR. | ÁTAK | SÍÐA | HØVUÐSÁBYRGD |
|---|---|---|---|
| 14 | Kunning til foreldur: Kunningartilfar gerast um instansir, sum foreldur kunnu koma í samband við. | 6 | B&U, barnaverndartænastan |
| 15 | Foreldur sum samstarvspartar og viðleikarar: Umvegis sjónlig átøk varpa ljós á alstóra týdningin av foreldrasamstarvi. | 6 | B&U, stovnarnir |

# ÁTØK UM FELAGS FAKLIGT SAMSTARV

| NR. | ÁTAK | SÍÐA | HØVUÐSÁBYRGD |
|---|---|---|---|
| 16 | Tvørfakligt samstarv: Mannagongdir og skjøl formast um leist og ábyrgd. | 7 | B&U |
| 17 | “Toghaldarar”: Menna nýggja skipan, sum skal tryggja samanhang, kontinuitet og heildarloysnir til barnsins besta. | 7 | B&U, barna-verndartænastan |
| 18 | Vitanardeiling tvørtur um fakmørk: At deila og styrkja um vitan sínámillum og skapa arbeiðsrelatiónir. | 7 | B&U |

# ÁTØK UM FRÍTÍÐ OG MENTAN

| NR. | ÁTAK | SÍÐA | HØVUÐSÁBYRGD |
|---|---|---|---|
| 19 | Faklig skikkað starvsfólk: At skipað verður fyri átøkum, sum geva íblástur og vitan til menning og læring. | 8 | B&U, stovnar |
| 20 | Mentanarkarmar: Skipa fyri samstarvi og kørmum millum listasøvn, tónleikastøð (musikkskúlin) og stovnar. | 8 | B&U, mentunardeildin |
| 21 | Alternativir frítíðarmøguleikar í býarlívinum. Samstarvsavtalur skulu gerast við áhuga- og ítróttarfeløg. | 8 | B&U, mentunardeildin |
| 22 | Barna- og ungdómsfagnaður: At skipað verður fyri afturvendandi fagnaði. | 8 | B&U, stovnar |



# ÁTØK UM HEILSU OG TRIVNAÐ

| NR. | ÁTAK | SÍÐA | HØVUÐSÁBYRGD |
|---|---|---|---|
| 23 | Heilsugóð tilboð: Ókeypis og javnbjóðis atgongd hjá stovnum til kommunalar hallir og svimjihallir. | 9 | B&U, mentamála-deildin |
| 24 | Stovnsumhvørvi innandura: Lýsingar, raðfestingar og ábøtur av stovnsumstøðunum, so at tær eru stimbrandi og hóska til aldursbólkin. | 9 | B&U, húsaumsitingin |
| 25 | Stovnsumhvørvið uttandura: Lýsingar, raðfestingar og ábøtur av uttandura økinum. Øll spælipláss skulu verða stimbrandi fyri brúkaran, og har eingin garður er, skal hann gerast. | 9 | B&U, húsaumsitin-gin, býðarskipanar-deildin |
| 26 | Tá nýggir stovnar verða bygdir: Skal innan- og uttandura økið gerast liðugt beinanvegin. | 9 | Býráðið, stjórn, B&U, tekniska fyrisiting, kt-deildin |
| 27 | Kostvanar: Yvirskipaðan og almennan kostpolitikk. | 9 | B&U, stovnarnir |
| 28 | Fyribyrgjandi arbeiði: Ávíst tvørfakligt samstarv, sum loftar børnum/ungum, um vandi er fyri mistrivnaði. | 9 | B&U, stovnarnir, barnaverndar-tænastan |

# ÁTØK UM SPÆL OG LÆRU

| NR. | ÁTAK | SÍÐA | HØVUÐSÁBYRGD |
|---|---|---|---|
| 29 | Innandura viðurskifti: Lýsing skal gerast av hvørjum stovni og skulu uppraðfestast til eitt mennandi námsumhvørvi. | 10-11 | B&U og húsa-umsiting í samráð við stovnarnar |
| 30 | Uttandura viðurskifti: Lýsing skal gerast av hvørjum stovnsspæligarði og skal uppraðfestast til eitt mennandi motoriskt umhvørvi. | 10-11 | B&U og húsa-umsiting í samráð við stovnarnar |
| 31 | Spæl og læran: Skipað skal verða fyri tiltøkum ella árligum tiltaki, har ljós verður varpað á spæl og læring. | 10-11 | B&U |
| 32 | Lýsing av tilboðum: Øll tilboð skulu lýsast og fáa líka stóran ans. | 10-11 | B&U, mentamálanevndin, stovnarnir |
| 33 | Miðlar: Starvsfólk skulu skúlast og víst á viðurskiftini rundan um ymsu miðlarnar, og duga at handfara tøknina. | 10-11 | B&U, kt-deildin |

# ÁTØK UM FÓLKARÆÐIÐ

| NR. | ÁTAK | SÍÐA | HØVUÐSÁBYRGD |
|---|---|---|---|
| 34 | Fólka- og samræði: At evnið verður ein sjálvsagdur partur í námsætlanarfrymlinum. | 12-13 | B&U, stovnarnir |
| 35 | Ávirkan á skipanir og politikkir: Skapilón í journalskipanini 360 verður broytt og dagførd, so at atlit verða tikin til barna- og ungdómsøkið. | 12-13 | Stjórn |
| 36 | Børn og ung eru virkin í fólkaræðinum: Barna- og ungdómsráð skal endurstovnast. | 12-13 | Stjórn og B&U |
| 37 | Tørvurin á óheftum barnaráð og ábyrgd: Lýsing og kunning til landspolitikararnir um neyðuga stigið, og at BUM átti at havt ábyrgdina av ráðunum sum eitt partleyst umhvørvi. | 12-13 | Býráðið og stjórn |

**BARNA- OG UNGDÓMSDEILDIN**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

NUDLAVIRKID